## Øktur vandi fyri blóðtøppi




Talan er millum annað um pínulinnandi tablettir við evninum diclofemac. Umleið 20 prosent av danska fólkinum brúka pínulinnandi tablettir, sum hava evnið diclofenac í sær. Tablettirnar verða brúktar ímóti pínu í rygginum, høvdinum ella vøddum og liðum. Hesar tablettirnar fáast í hondkeypi, eitt nú undir navninum Voltaren. Men nú vísir ein stór donsk kanning, at fólk, sum brúkan hendan heilivágin, eru í tvær ferðir størri vanda fyri at fáa blóðtøpp í hjartað enn onnur. Tað skrivar Politiken.
Christian Torp-Pedersen, hjartalækni á sjúkrahúsinum í Gentofte, sigur við blaðið, at heilivágurin krevur líka mong mannalív sum ferðslan. Kanningin, sum varð gjørd í árunum frá 1997 til 2005, umfataði meiri enn eina millión danir.

## Norðurlendsk lán til Íslands

Eftir at IMF hevur játtað Íslandi lán, gera Danmark, Noreg, Svøríki og Finnland tað sama. Danmark, Noreg, Svøríki og Finnland eru til reiðar at læna Íslandi 15 milliardir krónur fyri at hjálpa landinum ígjøgnum figgjarkreppuna. Boðini um láninii komu, eftir at Altjóða Gjaldoyragrunnurin í nátt samtykti at læna íslendingum 12 milliardir krónur. Hetta er fyrstu ferð í meiri enn 30 ár, at IMF veitir einum vesturevropeiskum landi lán. Frammanundan hava Føroyar lænt Íslandi 300 milliónir krónur.

# Síðsti seymur í kistu okkara

**Nú kostar tað líka nógv at flyta ein platt av farmi av útoyggj í Føroyum inn á meginøkið, sum tað kostar at flyta hann úr Grønlandi til Danmarkar**

ÚTOYGGJ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tá ið Farmaleiðir hjá Strandferðsluni vórðu einskildar, var tað seinasti seymurin í líkkistuna hjá útoyggjgjunum.

Tað ivast Tummas Frank Joensen úr Skúvoy ikki í.

Á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum um vikuskiftið harmaðist hann um tað heilt ómøguligu støðuna, sum útoyggjarnar eru komnar í síðani Farmaleiðir hjá Strandferðsluni vórðu einskildar.

- Fyrr kostaði tað einar 120 krónur at senda ein platt av vøru av útoyggj í annað pláss í landinum.

- Nú kostar sami plattur upp í góðar 900 krónur at senda.

Tað merkir, at tað kostar tað saman at fáa ein platt av farmi av útoyggj til annað pláss í Føroyum, sum tað kostar hann at flyta hann allar teir 2600 fjórðingarnar heilt úr Ilulissat úr Grønlandi til Ålborg í Danmark.

- Men umframt at tað kostar upp í 900 krónur at senda ein platt av útoyggj onkustaðni inn á meginlandið, má eg í ringasta føri hava fýra telefonsamrøður fyri at tryggja, at vøran kemur fram.

Tað kemst av, at fyrr vóru Farmaleiðir ein samanhangandi flutningseind, men tað er ikki støðan nú.

Tí skal vøran nú á døgum flytast við fleiri feløgum og av tí sama skal hon innskrivast sum farmur fleiri ferðir.

- Og hendir tað seg, at farmurin kemur at liggja í meiri enn fýra dagar á eini goymslu, skulu vit eisini betala goymsluleigu oman á alt.

Tummas Frank Joensen sigur, at hann gevur ikki flutningsfeløgunum skyldina.

Tey privatu feløgini kunnu neyvan gera tað bíligari, tí tey skulu eisini liva.



- *Tá ið Farmaleiðir vórðu einskildar, var tað seinasti knekkið hjá útoyggjunum, sigur Tummas Frank Joensen, sum er er avmyndaður, fremst á myndini á landsfundi hjá Javnaðarflokkinum um vikuskiftið. Aftanfyri hann situr konan, Elisabeth og Johan Samuelsen*

### Eru givin at flyta

Esbern í Eyðansstovu, sum hevur avgreiðsluna hjá Strandferðsluni í Mykinesi, kennir væl trupulleikan aftur.

- Vit vóru ógvuliga forharmað um, at Farmaleiðir vórðu einskildar, sigur hann.

Og eftirtíðin hevur víst, at útoyggjafólk fingu rætt í síni stúran.

Tað er nú so dýrt og tvørligt at flyta farm av útoyggj, at tey flestu eru rætt og slætt givin at flyta nakað sum helst.

- Síðani Farmaleiðir vórðu einskildar, er flutningurin minkaður heilt munandi, tí tað er ein sovorðin fyritøka at flyta farm av útoyggj, at fólk hætta sær ikki undir tað.

Esbern í Eyðansstovu sigur, at fólk vilja heldur ferðast sjálvi aftur og fram við vøruni ella tey fáa onkran, tey kenna, at taka hana við. At brúka vanligu farmaleiðirnar eru tey næstan givin við.

- Mangan eru tað matvørur, sum skulu flytast av útoyggj, og tey vilja ikki koma í tað støðu, at maturin strandar í onkrum pakkhúsi og spillist, tí tað er komið fyri. Av tí, at farmurin mangan skal ígjøgnum nógvar hendur, veksur vandin fyri, at hann strandar onkustaðni og tað kann verða stórur missur og tí flyta tey heldur vøruna sjálvi.

- Trupulleikin er, at nú skal sama vøra fraktast fleiri ferðir, tí Strandferðslan flytir bara til næstu havn. Úr Mykinesi tekur Strandferðslan sær bara av flutninginum inn á bryggjuna í Sørvági og úr Skúvoy verður farmurin bara fluttir inn á Sand og til hendan flutning fáa útoyggjarnar flutningsstuðul.

Men restina av flutninginum má eigarin sjálvur syrgja fyri og alt eftir, hvagar í Føroyum, vøran skal sendast skal hon fraktast fleiri ferðir og tað kann skjótt blíva dýrt.

# Vánalig kor at umvæla sethús á útoyggj

**Tað kemur fyri, at fólk á útoyggj noyðast at sleppa ætlanini at umvæla sær sethúsini, tí tað kostar beinanvegin einar 15000 krónur at fáa nakrar trillubørur av sandi ella nøkur vindeygu til endamálið**

ÚTOYGGJ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Støðan hjá teimum, sum búgva á útoyggj, er nú so vánalig, at tað eru dømi um fólk, sum hava verið noytt at sleppa ætlanini at umvæla sær sethúsini, tí flutningurin er so dýrur.

Eisini Olga Biskopstø, skrivari í Útoyggjafelagnum kennir trupulleikan við flutninginum ímillum útoyggjarnar og meginlandið, sum Tummas Frank Joensen úr Skúvoy og Esbern í Eyðansstovu í Mykinesi, lýsa í aðrar grein her í blaðnum

- Farmaflutningurin er ein stórur trupulleiki. Útoyggjarnar fáa flutningsstuðul ímillum útoyggj og næstu Havn. Men skal vøran flytast longri enn tað, má eigarin sjálvur syrgja fyri tað, og tað er rættiliga skjótt, at tað verður heilt dýrt

### Geva skarvin yvir

Hon sigur, at fyrr var flutningurin við tyrluni eisini umfataður av flutningsstuðlinum, men tað er hann í stóran mun ikki longur og tað er steinur oman á byrðu.

Nú er bara smáflutningur við tyrluni umfataður av flutningsstuðlinum, men beinanvegin talan er um størri nøgdir, skal tyrlan leigast.

- Tað merkir, at tað kostar beinanvegin einar 12000-15.000 krónur at flyta nakra nøgd av vøru til og frá útoyggj.

Olga Biskopstø sigur, at hon veit dømi um, at fólk á útoyggj hava givið skarvin yvir at umvæla sær sethúsini, tí tað kostaði teimum einar 15.000 krónur at fáa nøkur vindeygu og timbur út í oynna og tað ger tað beinanvegin rættiliga vónleyst, sigur hon.

- Tað er rættiliga skjótt, at tað kann kosta upp í einar 12.000-15.000 krónur at fáa upp í nakrar fáar blandimaskinur av sandi út í Mykines til at stoypa við, leggur Esbern í Eyðansstovu afturat.

Olga Biskopstø sigur, at eitt er, at flutningurin er so dýrur og roksutur, at fólk gevast. Men eitt annað er, at tað er ein sálarfrøðilig forðing fyri allari menning, við tað, at ongin hættar sær undir nakað, so tvørlig sum støðan er.